# ongantíð gloymi




*Ólavur slapp eisini at stýra MOB bátinum og tað gekk við rúkandi ferð*




*Her eru teir á veg ígjøgnum Zues-veitina. Myndin er tikin av brúnni og eisini her sæst, hvussu stórt skipið er*

og eisini inn í húsini og tær vóru spakar og vanar við fólk, tí tær vinkaðu til okkara. Tær vistu, nær málttíðirnar eru og tá lógu tær altíð framvið og lúrdu seg inn í húsini at bidda sær ein góðan bita.

Eitt sera spennandi upplivilsi var eisini, tá ið hann slapp við upp í tann ræðuliga stóra kranan, tá ið teir lossaður.

- Tá vóru vit yvir 50 metrar uppi í luftini og tá var stuttligt at síggja fólkini niðri á bryggjuni, tí tey sóu ikki út til at vera størri enn flugur.

At sigla ígjøgnum Zues veitina var eisini merkiligt , tí har var øgiliga smalt og í báðum síðum var bara sandur og aftur sandur so langt, sum eygað rakk, men tey sóu eisini bygdir framvið veitini.

Men tá ið teir komu úr aftur veitini, var so nógvur sandur fokin umborð, at neyðugt var at spula dekk og alt annað, tí alt var tann beri sandur og tá slapp Ólavur eisini at royna seg við spuluslanguni.

Hann fekk eisini onkrar løtur at ganga við at standa og eygleiða flúgvifisk í Miðjarðarhavi og Reyðahavi.

Tað var ein sjón fyri seg, tí teir vóru í ymsum litum, gulir og bláir, og kundu sveima einar 150 metrar í luftini.



### Tryggjaðu skipið ímóti sjórænarum

Eitt tað mest spennandi á ferðini var, tá ið teir skuldu ígjøgnum Malakkafjørð ávegis til Singapore. Tað er eitt sjóøkið, sum er illa herjað av sjórænarum og tí er neyðugt at tryggja skipið ímóti hesum sjórænarum, sum gera um seg har á leiðini. Og tað verður gjørt við at steingja alla apteringina.

- Síðani verða allir ljóskastarar tendraðir og brandslangurnar verða hongdar út um skipssíðurnar at spræna útyvir skipssíðuna, so at sjórokið forðar teimum í at ganga upp á skipið. Annars eru sjórænarar væl útgjørdir við bæði maskinbyrsum og skjóttgangandi bátum. Er talan um smærri skip, hendir tað, at teir taka alt skipið um tað er og blaka manningina íland á onkrari oyggj. Skipið verður so málað og skiftir navn og so verður skip og farmur selt. Tað kemur eisini fyri, at teir ganga upp á skip og taka alt, sum hevur verið, bæði pening, sjónvørp og annað. Og hóast Grete Maersk er bæði stór og skipssíðurnar eru høgar og tað siglir skjótt, verður bundið um heilan fingur.

### Alt vendist við

Bæði Ólavur og mamman hjálptu eisini pápanum í galluni og serliga mamman fer helst at verða saknað umborð, tí ímeðan hon var við, fingu teir nýbakaða kaku hvønn dag.

Tað einasta, sum var ringt, tað var at venja seg við tíðarmunin.

Tað eru átta tímar á muni á føroyskari tíð og tíðini í Singapore, so tað kundi vera ringt at venja seg við at sova um náttina og vera uppi um dagin, tí alt vendist við.....

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Ólavur er í langfarasigling við pápanum. Tað var hann eisini tá ið hann var sjey ára gamal, men tað var við einum tangabáti, sum var væl minni enn Greta Maersk.

-Vit sóu eitt sama slag skip og tað sá øgiliga lítið út afturímóti. Yvirhøvur hevur hesin túrurin givið honum eitt heilt øðrvísi áskoðan á støðd á skipum.

-Tá ið Smyril kom, helt eg, at hann var øgiliga stórur, men nú er hann onki, staðfestir hann.

## Ein ordans skúta

Grete Maersk er ikki hissini skip. Tað er 370 metrar til longdar og tekur ikki færri enn 10.000 bingjur. Úr maskinrúminum, upp á brúnna, eru heili 19 dekk og bara skorsteinurin er tríggjar hæddir.

Borð úr borði er hon 43 metrar breið á brúgvatakinum og vanliga siglingarferðin er heilar 25-26 míl. Men teir hava havt hana uppi á 28-29 mílum onkuntíð, teir vóru seinkaðir eftir ferðaætlanini.

Grete Maersk hevur stabilisatorar, ið eru finnur upp á 18 fermetrar, hvør, sum stinga úr skipssíðunum. Tað ger, at altíð er sum á gólvinum og tað longsta, hon hevur lagt seg, er bara 4 stig. Í sigling rørist hon ikki, so tá er bara, tá ið hon snarar fyri at halda av fyri øðrum skipum, at hon leggur seg eitt stig ella bæði tvey í borðið. Veðurtíðindini eru so góð nú á døgum, at tað ber sum aloftast til at sigla uttanum ódnarveður og tað verður vanliga gjørt fyri at verja farmin. Men tey kunnu gott hava vind upp á 25-30 metrar um sekundið, uttan at vita av tí umborð.

Trygdarmanningin við Gretu Maersk er 13 mans, men við reparatørum og aspirantum eru tey 24-26 fólk við.

Seint í summar varð Emma Maersk tikin í brúk og nú er hon heimsins størsta bingjuskip, tí hon hevur akkurát yvirhálað Gretu eitt lítið sindur, tí hon er 27 metrar longri enn Greta og tekur 1.000 bingjur fleiri.